# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ikki á leistum

Eftir ár í politiskari oyðimørk sær tað út til Sjálvstýrsiflokkurin, hevur fingið møguleikan at sleppa inn í politiska varman. Royndin við minnilutastjórn gevur flokkinum ein tjans, sum hann ikki fær á hvørjum degi. Tað var tann tíð, tá ið Sjálvstýrisflokkurin var mestsum sjálvskrivaður til at vera við í samgongu. Leikluturin sum politisk ífylla gav flokkinum skemtiliga heitið "kittflokkurin". Kittflokkur ella ikki, støðan gav hesum lítla flokki eina ávirkan, sum sjáldan stóð mát við støddina. Nú er tað sum kunnugt ikki støddin, sum telur men dygdin, og ásannast má, at flokkurin hevði sera dugnaligar og høgt mettar politikkarar, sum dugdu at vinna floksins hjartamálum frama. Tað er ikki av tilvild, at Sjálvstýrisflokkurin verður samanborin við radikala flokkin í Danmark, sum er ein lítil flokkur við ávísum hjartamálum, sum verða borin fram av sterkum og markantum persónum. Samstundis kann staðfestast, at politiska rákið í Danmark seinastu mongu árini hevur gingið radikala flokkinum ímóti, og í dag hvur hann lítla politiska ávirkan.

Myndin av einum flokki, sum støðugt skiftir síðu fyri altíð at vera við, og sum endar úti í kuldanum, kann hava ávirkan á Sjálvstýrisflokkin, ið hugmyndaliga er teimum radikalu rættiliga líkur. Tað kann í hvussu so er staðfestast, at Sjálvstýrisflokkurin ikki loypir á leistum fyri at koma í samgongu. Landsnevndin mælir tingbólkinum frá at fara uppí sitandi samgongu. Í staðin fyri at gerast partur av samgonguni og fáa landsstýrissess verður talað um at tryggja flokkinum ávirkan við breiðum samstarvi á tingi. Landsnevndin vil ikki, at Sjálvstýrisflokkurin gerst stuðulsflokkur hjá sitandi samgongu. Við øðrum orðum: hvørki landsstýrissess ella formligt samstarv sum stuðulsflokkur.

Eftir fundin í landsnevnd Sjálvstýrisfloksins er tað sostatt greitt, at stuðul frá hesum flokki er alt annað enn sjálsagdur. Her er komið annað bolladeiggj i ovnin, nýtt ættarlið við góðum politiskum handalag. Her er onkur, sum dugir at síggja, at flokkurin fær meira ávirkan við ikki at fara uppí samgonguna og við ikki gerast formligur stuðulslokkur. Heldur er ynskið, at ábyrgdarfullur politikkur verður førdur, soleiðis at arbeiðsfriður aftur fæst á Føroya Løgtingi. Snilt! Víðari verður talað um at loysa átrokandi mál, sum fíggjarlógina fyri 2009, og kann hetta tulkast, sum Che fær arbeiðsfrið hetta árið út. Við hesi strategi skapar Sjálvstýrisflokkurin eina politiska óvissu, sum gevur styrki, men sum er alt annað enn hugalig hjá løgmanni.Vandin við hesari strategi er, at hon er í so vágin til ta parlamentarisku styrki, sum flokkurin hevur. Løgmaður kann skjótt missa tolið og taka Fólkaflokkin inn í staðin fyri Miðflokkin. Nógv bendir á, at Fólkaflokkurin er búgvin og so hava vit meirilutastýrið aftur við einari um ikki dynamiska so tó eini stabilari samgongu.

**Sosialurin**

## Bíblian innblást av Gud - ikki mannaorð um Gud

**RICHARD DANIELSEN**



**33. partur**

Í 1948 gjørdist Ísrael ein statur aftur. Tjóðirnar rundan um teir hava alt síðani roynt at fáa teir burtur aftur haðani, men tað fer ikki at eydnast. Vit hava jú sæð, at Gud hevur ásett dag til dóm yvir henda heim, men hevur lovað Ísrael signing og frelsu í allar ævir. Har verður tó eitt øðiligt ragnarrok, áðrenn Kristus tekur valdið og frelsir tey endaliga. Fúrtanndi kapitul, í hesi bókini, sigur frá hesum.

Áttandi kapitul talar um signingar Ísraels í komandi døgum, sum eisini skal gera, at heidningatjóðirnar søkja Gud. Nýggjundi kapitul talar um dóm yvir nøkur fólkasløg og um signingar á døgum Messiasar. Tíggjundi kap. talar eisini um at koma heimaftur, og um at heidningatjóðirnar falla. Ellivti kap. um ringa tilgongd undir óndum leiðarum.

Tólvti kap. sigur, at Harrin skal sora makt heidninga og frelsa Júresalem. Hús Dávids, og tey sum í Jerúsalem búgva, viðurkenna at Jesus frá Nazaret er teirra Messias, v.10. Landið skal syrgja í álvara. Í trettanda og fjúrtanda kap. profeterar Zacharias um Messias og signingarnar á tíð hansara. Henda tíð er ein sera álvarslig tíð, og synd verður als ikki told. Her verður peika á Hirðan, Jesus Kristus, sum skal sláast 13,7, og enn ein øðilig roynd stendur Ísrael fyri,13,8-9.

Síðani kemur profeturin inn á síðstu trongd Jerúsalems og dag Harrans, sum so nógvir av hinum nevna um. Zaccharias sigur í 14,2, at Harrin skal savna allar tjóðir til hernað móti Jerúsalem, býurin skal verða tikin, og har verður ein ræðulig støða. Men fíggindar Ísraels fáa ikki sín vilja. Harrin minnist lyfti sítt til Ábraham og øll lyftini hann hevur givið. Tá er tað, Harrin grípur inn og kemur sjálvur niður á jørðina og frelsir sítt neyðstadda fólk. Kap. 14, 4 sigur tað soleiðis:

Tann dag skulu føtur Hansara standa á Oljufjallinum, ið er beint yvir av Jerúsalem, eystanfyri; Oljufjallið skal klovna mitt tvørtur av, úr eystri í vestur, so har verður stórur dalur, við tað at onnur helvtin av fjallinum víkur norðureftir, og hin helvtin suðureftir.

Tit skulu flýggja til dalin millum fjøll Míni; tí dalurin millum fjøllini skal náa líka til Azel; tit skulu flýggja, sum tit flýddu undan jarðskjálvtanum á døgum Uzziasar judakongs. Tá skal HARRIN Gud mín koma - og øll hini heiløgu við tær.

Zacharias endar við einum øðiligum dómi yvir heidningatjóðirnar, ið hava barst við Jérúsalem. Síðani sigur hann, at Jerúsalem verður ein tilbiðingarstaður har eisini tey , sum eftir eru av tjóðunum ið herjaðu á Jerúsalem skulu koma og halda leyvsalahøgtíðina.

Ja ein undurfull tið fyri allar tjóðir, tá ið Gud sjálvur tekur valdið á jørðini. Esaias sigur tað soleiðis:

Tá skal úlvurin búgva saman við lambinum, og leoparđurin liggja hjá geitarlambinum; kálvurin, ungleyvan og feitineytini skulu ganga saman, og smádrongur skal reka tey.

Kúgv og bjørn skulu liggja saman og eta; kálvurin og bjarnarungin skulu liggja lið um lið; og leyvan skal eta hálm sum neyt.

Bróstabarnið skal spæla sær við holu høggormsins, og barnið, sum nýliga er lagt av brósti, skal rætta út hondina yvir reiður eiturormsins.

Eingin skal gera nakað ilt, og eingin skal forkoma nøkrum, á øllum heilaga fjalli Mínum; tí jørðin skal vera full av kunnskapi um HARRAN, eins og vatnið fjalir havsbotnin.

Tann dag skulu heidningarnir leita til rótkvist Ísais, ið stendur sum hermerki tjóðanna, og bústaður Hansara skal vera dýrd.

**Framhald**

## Forvitnislig vitjan úr Japan

*Tíðindaskriv frá SamVit*

Í hesum døgum vitjar altóðakendalistahandverkskvinnan, Jorie Johnson í Føroyum. Hon hevur tvær bókaútgávur í viðførinum og ferðast kring heimin við framsýningum, fyrilestrum og verkstovum innan tøving.

Endamálið við vitjanini er, at menna førleikar innan tøving, og frá fríggjadegi 8. august til og við sunnudag 10. august skipar Ása Hátún, ið hevur drúgvar royndir innan ullarbeiði, fyri verkstovu í Pakkhúsinum í Bø við Jorie sum undirvísara.

Mánadagin 11. august verður skipað fyri almennum fyrilestrum í Norðurlandahúsinum við m.ø. Jorie sum gestarøðara.

Tað er SamVit, ið samskipar tiltakið í Norðurlandahúsinum.

Jorie gistir í Bø hesar dagarnar, men mikudagin 6. august verður vitjað í Havnini. Um áhugi er fyri at fáa orð á Jorie, ber til at ringja til Ásu Hátún á 226970 og fáa eina avtalu í lag.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.